## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av vestri og útnyrðingi og sólglottar, men eisini ælingur, partvís vátaslettingur. Hitin millum 3 og 6 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Fyrrapartin strúkur í vindi av útnyrðingi, men seinnapartin lot av ymsum ættum. Yvirhøvur turt og sólglottar og hitin millum 4 og 7 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av landsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 6 og 9 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av landsynningi og leygardagin yvirhøvur turt, men sunnudagin regn. Hitin millum 7 og 11 stig.

# Leif teknaði Vesturstovu

**Fuglafjarðar kommuna umhugsar at hækka skattaprosentið nakað og byggja eitt ellisheim, um greiða ikki skjótt fæst á, hvussu verður við eldrarøktini, sum ætlandi skal leggjast út til kommunurnar.**

ELDRARØKT
*Vilmund Jacobsen*

Í greinini um eldrasambýlið, Vesturstovu í Fuglafirði, gjørdu vit nógv burtur úr, at tekniska deild hjá Fuglafjarðar kommunu sjálv hevur tikið sær av at projektera og hava eftirlit við nógvum av teimum arbeiðum, sum kommunan hevur gjørt seinastu árini.

Í greinini nevndu vit havnabyggingar, tunlarnar til frysting, barnagarðin, brandstøðina og Vesturstovu, sum nú hevur fingið seks pláss aftrat í kjallaranum.

Samrøða var við Leif Petersen, byggifrøðing, sum er maðurin, ið hevur teknað eldrasambýlið úr enda í annan.

Verkfrøðingurin hjá kommununi, sum leiðir teknisku deild og byggifrøðingurin hava saman tikið sær av útrokningum, tekningum og eftirliti.

Lítið man vera at ivast í, at her er nógvur peningur spardur, og at kommunan hevur fingið meira burtur úr við at brúka tey fólk, hon kortini hevur í starvi.

Tá ið Vesturstova varð bygt seinnapartin í nítiárunum, hevði kommunan nakrar handverkarar í starvi, og saman við teknisku deildini vóru hesir drívmegin aftanfyri snotiliga verkið, sum í dag hýsir 15 fólkum – við góðum útsýni yvir bygdina og tað, sum rørir seg í henni og rundan um hana.

Í greinini um Vesturstovu og søguna aftanfyri hana, lá myndin av Leif, sum vit tóku í samband við samkomuna í Fuglafirði, eftir.

Men her hava vit so mannin!

Vesturstova er eitt valaverk, og eingin ivast í, at her hevur Fuglafjarða kommuna fingið nógv fyri tær 6 milj. krónurnar, sum eldrasambýlið kostar í dag.



*Leif Petersen uttanfyri eldrasambýlið, Vesturstovu í Fuglafirði, sum hann hevur teknað úr enda í annan.*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

### Ellisheim

Á samkomuni, tá ið kjallarahæddin var liðug og tikin í nýtslu, segði bygdarráðsformaðurin, Sigurd Simonsen, at kommunan eisini umhugsar at byggja eitt ellisheim í bygdini.

Sum skilst, hevur kommunan í hyggju møguliga at hækka skattaprosentið nakað og byggja heimið, um greiða ikki skjótt fæst á, hvussu verður við eldrarøktini, sum ætlandi skal leggjast út til kommunurnar.

Í Leirvík er eisini útgrivið og planerað fyri einum eldrasambýli, sum vit fara at venda aftur til.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | ÷9 |
| Nuuk | ÷5 |
| Qaqortoq | 2 |
| Ammassalik | ÷6 |
| Saint John's | 7 |
| Halifax | 5 |
| Reykjavík | 1 |
| Seyðisfjørður | 0 |
| Tórshavn | 6 |
| Lerwick | 6 |
| Aberdeen | 9 |
| London | 12 |
| Tromsø | 3 |
| Bergen | 4 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 4 |
| Keypmannah. | 9 |
| Helsinki | 3 |
| Moskva | 6 |
| Berlin | 9 |
| Warzawa | 7 |
| Kiev | 6 |
| Bukarest | 12 |
| Paris | 14 |
| Madrid | 20 |
| Róm | 21 |
| Malorca | 23 |
| Athen | 19 |
| Malta | 23 |
| Tunis | 24 |
| Beijing | 9 |
| New Dehli | 30 |
| Bangkok | 32 |
| Jakarta | 34 |
| Sydney | – |
| New York | 11 |
| Miami | 30 |
| Los Angeles | 17 |
| Meksikobýur | 20 |
| Panama | 29 |
| La Paz | 5 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 17 |

## LUFTTRÝSTIÐ




Eitt lágtrýst, 998 hPa vestan fyri Ísland fer eystureftir og kuldabrúgvin haðani fer um Føroyar mikumorgunin.




Lágtrýstið norðan fyri Føroyar fer eystureftir og gevur eitt skifti hvassan vind av útnyrðingi. Aftaná verður eitt minni hátrýst yvir Føroyum.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 28/10 kl. 06[00]– 29/10 kl. 06[00]. Hitin í gjár: 4,6°
Minsti hiti máldur í okt.: ÷4,0° Mesti hiti máldur í okt.: 18,4°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 3,3 mm – mált frá 28/10 kl. 06[00]– 29/10 kl. 06[00]
Avfallið higartil í oktober: 69,3 mm

## TIPS 13 úrslit
**Vika 43 – 26. oktober**

| | | |
|---|---|---|
| 1. | Viborg–FC København | 2 |
| 2. | Arsenal–Blackburn | 2 |
| 3. | Birmingham–Manchester C. | 2 |
| 4. | Chelsea–West Bromwich | 1 |
| 5. | Liverpool–Tottenham | 1 |
| 6. | Manchester U.–Aston Villa | X |
| 7. | Middlesbrough–Leeds | X |
| 8. | Newcastle–Charlton | 1 |
| 9. | Bradford–Norwich | 1 |
| 10. | Burnley–Portsmouth | 2 |
| 11. | Coventry–Walsall | X |
| 12. | Nottingham F.–Leicester | X |
| 13. | Watford–Sheffield W. | 1 |

**Prognosa:**

| | |
|---|---|
| 13 røtt: | **Eingin vinnari** |
| 12 røtt: | **7.395,- kr.** |
| 11 røtt: | **440,- kr.** |
| 10 røtt: | **80,- kr.** |

Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum

## TIPS 12 úrslit
**Vika 43 – 27. oktober**

| | | |
|---|---|---|
| 1. | Brøndby–AaB | 1 |
| 2. | FarumFC Midtjylland– | 1 |
| 3. | Køge–Esbjerg | 2 |
| 4. | OB–AB | X |
| 5. | Silkeborg–AGF | 1 |
| 6. | FC Fredericia–Horsens | 2 |
| 7. | Frem–Randers Freja | 2 |
| 8. | Vejle–Ølstykke | 2 |
| 9. | Fremad Amag.–FC Nordjyll. | 2 |
| 10. | Nykøbing F. All–Næstved | 2 |
| 11. | Skive–Dalum | 2 |
| 12. | Slagelse–Kalundborg– | 1 |

**Prognosa:**

| | |
|---|---|
| 12 røtt: | **85.886,- kr.** |
| 11 røtt: | **6.720,- kr.** |
| 10 røtt: | **457,- kr.** |

Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum

**Vika 43 – 27. oktober**

1. Centrum:
**48 - 46 - 55 - 27 - 73 - 24 - 39**

1. Ramme:
**30 - 47 - 50 - 72 - 45 - 28 - 41 - 49 - 51 - 64 - 08 - 36 - 63 - 56 - 15 - 26 - 67 - 65 - 12 - 61 - 31 - 57 - 17 - 20 - 62 - 74 - 03 - 25 - 33 - 75**

Fuld plade:
**11 - 04 - 02**

Fri spil: **_OX_N**

| | | |
|---|---|---|
| Fuld plade: | 1. pr. | **1.079.018,- kr** |
| 1. Ramme: | 2. pr. | **117.097,- kr.** |
| 1. Centrum: | 3. pr. | **58.563,- kr.** |
| Ramme: | 4. pr. | **3.151,- kr.** |
| Centrum: | 5. pr. | **84,- kr.** |

Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum

## VESTFALLSKYRRINDI

20. okt.: Mánin longst frá jørðini
29. okt.: Seinna kvarter
4. nov.: Tendring/Mánin næstur jørðini

Kelda. Álmanakkin 2002

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 30. okt. | 01.24 | 14.03 | 00.24 | 13.03 | 00.39 | 13.18 | 03.24 | 16.03 | 04.24 | 17.03 | — | 12.18 | 11.18 | 23.42 | 01.39 | 14.18 | 02.39 | 15.18 | 01.09 | 13.48 | 02.24 | 15.03 |
| 31. okt. | 02.27 | 14.51 | 01.27 | 13.51 | 01.42 | 14.06 | 04.27 | 16.51 | 05.27 | 17.51 | 00.42 | 13.06 | — | 12.06 | 02.42 | 15.06 | 03.42 | 16.06 | 02.12 | 14.36 | 03.27 | 15.51 |
| 1. nov | 03.14 | 15.38 | 02.14 | 14.38 | 02.29 | 14.53 | 05.14 | 17.38 | 06.14 | 18.38 | 01.29 | 13.53 | 00.29 | 12.53 | 03.29 | 15.53 | 04.29 | 16.53 | 02.59 | 15.23 | 04.14 | 16.38 |
| 2. nov | 04.01 | 16.24 | 03.01 | 15.24 | 03.16 | 15.39 | 06.01 | 18.24 | 07.01 | 19.24 | 02.16 | 14.39 | 01.16 | 13.39 | 04.16 | 16.39 | 05.16 | 17.39 | 03.46 | 16.09 | 05.01 | 17.24 |

5 707265 100036 >